# Ivi um ólavsøkuprædikuna

**Lítil vika er til ólavsøku, og framvegis er óvist, hvør fer at halda ólavsøkuprædikuna. Bispur sigur seg ikki vita annað enn, at Ólavur Rasmussen heldur hana, meðan Ólavur sigur, at tað er ein nýggj støða fyri honum, at hann skal halda prædikuna.**

*Lítla viku undan ólavsøku-0prædikuni tykist ivi at hava stungið seg upp, um hvør prestur fer at halda prædikuna í ár*



ÓLAVSØKUPRÆDIKA
*Páll Holm Johannesen*

Seinastu dagarnar hevur verið teskað í krókunum um, at óvissa hevur stungið seg upp, um hvør skal halda ólavsøkuprædikuna í ár. Vanlig mannagongd er, at tað er tann nýggjasti presturin, sum fær heiðurin at halda prædikuna ólavsøkudag. Seinnu árini eru fleiri nýggir prestir settir , og tískil fellur valið á tann av nýggju prestunum,ið hevur verið longst í prestastarvinum.

Í ár hevur Hans Jacob Joensen, bispur, heitt á Ólav Rasmussen, sum hevur verið longst í prestastarvinum, um at halda prædikuna. Óvissa hevur kortini tikið seg upp lítla viku áðrenn ólavsøkuprædikan skal haldast.

Í tíðindaskrivi og í lýsing hevur Føroya Stiftstjórn boðað frá, at tað er Ólavur Rasmussen, sum skal halda ólavsøkuprædikuna í ár. Tá vit mikumorgunin hittu Hans Jacob Joensen,bisp, á máli, hvør prestur verður á prædikustólinum ólavsøkudag, svarar bispur, at hann veit ikki annað, enn at tað er Ólavur Rasmussen sum heldur prædikuna, tí hann hevur ikki fingið nakra formliga umbøn frá Ólavi, um at sleppa undan at halda prædikuna.

Tá vit so vendu okkum til Ólav Rasmussen um nakað hald var í leysatíðindunum um, at hann ikki fer at halda prædikuna, svarar Ólavur, at tað verður Inga Poulsen Dam, sum skal halda hana. Tá vit nevna fyri Ólavi, at bispur sigur, at tað hann sum skal halda hana, gerst hann eitt sindur skakkur, og sigur, at tað er ein nýggj støða fyri honum, tí hann helt, at tað var Inga Poulsen Dam, sum heldur prædikuna.

Inga Poulsen Dam, sum er prestur í Vága Prestadømi, er næst Ólavi í røðini at halda ólavsøkuprædiku, og verður tað ikki Ólavur, so fellur heiðurin á Ingu Poulsen Dam.

### Inga peikar á Ólav

Inga Poulsen Dam veit einki um, at tað er hon sum skal fyrireika seg til at vera á prædikustólinum í Dómkirkjuni ólavsøkudag, og sigur, at tað er Ólavur sum hevur fingið ta uppgávuna í ár, og vísir okkum síðan til bisp.

Hvussu verður og ikki ólavsøkudag, so er vist, at nú lítla viku undan ólavsøku, so er eingin farin undir at skriva ólavsøkuprædikuna, tí framvegis er ikki heilt greitt, hvør skal halda prædikuna.

Ráðgevi hjá Høgna Danielsen:

# – Tórshavnar Kommuna ger týðuligan mismun á borgarum í kommuni

**Ein av ráðgevunum hjá Høgna Danielsen heldur, at Tórshavnar Býráð er ikki lítið djarvt við at halda á við at sýta øllum uppskotunum hjá Høgna Danielsen um nýtt ventilatiónshús. Kemur ikki ein skjót loysn á málið, so kann tað kosta Tórshavnar Býráð eitt dýrt sakarmál, sigur hann.**

BYGGIMÁL
*Páll Holm Johannesen*

Vit høvdu týsdagin eina grein um nýggja bygningin hjá Høgna Danielsen, sum hevur steðgað byggingini, av tí, at Tórshavnar Býráð sýtir honum at byggja hóskandi ventilatiónshús.

Hóast Høgni fleiri ferðir hevur lagt nýggj uppskot um ventilatiónshús, vísir Býráðið øllum uppskotum aftur. Býráðið bindur seg í eina dekleratíonssemju, sum Býráðið og Høgni Danielsen gjørdu í 2001.

Ì tí semjuni verður heimila broytingum, so leingi kommunan góðkennir broytingarnar. Tá Høgni fór undir at projektera nýggja bygningin, vísti ventilatiónsfyritøkan Demich á, at ventilatiónshúsið mátti gerast størri enn avtala í dekleratiónssemjuni, um bygningurin skal hýsa so nógvum fólkum, sum ætlanin er.

Hóast Høgni fleiri reisur, í samráð við verkfrøðingar og arkitektar, er komin við broytingaruppskotum, so heldur Býráðið fast upp á dekleratiónssemjuna. Henda áhaldandi ósemja hevur havt við sær, at Høgni Danielsen hevur valt at steðga byggingini. Ein av ráðgevunum hjá Høgna Danielsen, sum ikki ynskir at verða navngivin, fer ikki væl við Býráðnum

– Tað verður týðuligur mismunur gjørdur á borgarunum í Tórshavnar Kommunu, tí fleiri dømi eru um persónar sum hava serligt tilknýti til einstakar býráðslimir, ið hava fingið skjóta og lætta viðgerð í býráðnum, sigur ráðgevin.

Hann vísir á, at kemur ikki ein skjót loysn á ósemjuni millum Tórshavnar Býráð og Høgna Danielsen kann tað skjótt enda við einum kostnaðarmiklum sakarmáli.

- Í síðsta enda verður tað skattaborgarin í Tórshavnar Kommunu, sum má rinda fyri allar útreiðslurnar, sum Høgni Danielsen hevur í løtuni, orsaka av hann hevur noyddur at sleppa byggingini, sigur ráðgevin at enda.

# Nýtt alment vesi og busskýli á Eiði

**Nýggi bygningurin á Eiði er ein samanseting av almennum vesi og busskýli. Hædd er eisini tikin fyri einum møguligum kunningardiski í bygninginum.**

BYGGING
*Páll Holm Johannesen*

Fyri stuttum var snotuligur bygningur bygdur uttanfyri kirkjuna á Eiði. Talan er um ein bygning, ið bæði er ætlaður til busskýli og alment vesi.

Tordur Niclasen, sum í løtuni er staddur í Grønlandi, sigur við Sosialin, at tørvur hevur leingi verið á einum nýggjum busskýli og almennum vesi, og tí er at fegnast um, at tað langt um leingi er fingið frá hondini.

Eiðisfólk hava ikki havt alment vesi áður, og tískil er talan um fyrsta almenna vesið á Eiði. Umframt vesi og busskýli, er eisini bygt eitt rúm, sum møguliga skal nýtast til ein kunningardisk í framtíðini,



*Eiðisfólk fáa nú nýtt busskýli og vesi uttanfyri kirkjuna*

Hvussu verður við busskýlinum hinumegin vegin er framvegis óvist, men líkt er til at tað verður tikið niður, nú nýtt busskýli er bygt.



*Brandur Øssurson hevur pakkað kuffertið og flytur til Danmarkar 1. september*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Brandur flytur av landinum

**Eftir 38 ár í Føroyum flytir Brandur Øssurson av landinum. Hetta merkir, at Jazzfestivalurin eisini fer í søguna**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*

Eg vildi gjarna hava festivalin í 20 ár. Havi valt mær hetta tíðspunktið sum eitt hóskandi tíðspunkt at gevast.

Orðini omanfyri eigur Brandur Øssurson, sum í tjúgu ár hevur verið primus motor aftanfyri Tórshavnar jazz-, fólka- og bluesfestival. Men nú er liðugt við Jazzfestivalinum, tí Brandur og kona hansara flyta til Danmarkar.

Brandur, sum er sonur Janus Øssurson, er hálvur føroyingur og hálvur norðmaður. Hann fyllir sjeyti ár í januar mánað, men "bert" 38 av hesum árunum heuvr hann verið við føstum bústaði í Føroyum.

Konan, Unna, og Brandur fara frá 1. september at halda til í einari íbúð á Frederiksberg.

### Liðugt við festivali

Seinni árini hevur Brandur Øssurson verið mest kendur fyri sín leiklut í sambandi við Jazzfestivalin. Tað var Brandur, sum tók stig til fyrsta festivalin í 1984, og hann fyrireikaði tann tjúgunda og síðsta í røðini fyri nøkrum vikum síðani.

Hugskotið til festivalin fekk Brandur, tá hann gjørdist føroyska umboðið í Norðurlendska jazzfelagsskapinum.

Fundirnir vórðu vanliga hildnir í sambandi við ymsar festivalar. Har sá eg, hvussu heilir býir, sum ikki allir vóru serliga stórir, livdu í sambandi við jazzfestivalir. Stór nøvn komu og spældu í fimleikarhøllum. Stemningurin var heilt serligur, sigur Brandur.

Hetta var um tað mundi, tá Norðurlandahúsið júst var bygt, og somuleiðis var Hotel Føroyar latið upp. Eisini sigldi Norrøna til Føroya.

Hesi trý gjørdu, at tað var kapasitetur fyri at halda ein festival í Føroyum.

Samstundis sum tað kundi gerast spennandi tónlistarliga, so fekk tað eisini ferðafólk hendavegin, sigur Brandur Øssurson.

Og tað lá eisini ræðið fyri at fáa kend nøvn til Føroya. Norðurlandahúsið var ein góður karmur um festivalin, og útlendskir tónleikarar vildu fegnir koma til Føroya.

Tað kostar nógv at fyrireika ein tílíkan festival, men tónleikararnir vildu oftast

koma til Føroya fyri at uppliva oyggjarnar. Stór nøvn verið ógvuliga lagalig, og tískil hevur tað verið møguligt at skipa fyri, sigur Brandur.

Tá festivalurin var sprottin úr einum norðurlendskum samstarvi og varð hildin í Norðurlandahúsinum, so vóru tað fyri tað nógva norðurlendsk nøvn, sum spældu á jazzfestivalinum.

Bjørn Afzelius, Kim Larsen, Cecilia Nørby og Hanne Boel eru bert nøkur av teimum kendu, sum hava luttikið á festivalinum.

Jazzfestivalurin helt til í Norðurlandahúsið hvørt ár í august í sjeytan ár. Fýra kvøld við jazzi vakti eisini ans uttanlands og var nakað av tí, Norðurlandahúsið í Føroyum var mest kent fyri tey fyrstu árini.

Men eftir seytjan í Norðurlendskum regi flutti festivalurin oman í miðbýin. Listastevna Føroya kom staðinfyri Jazzfestivalin og aðrar festivalar, og Brandur var av fyrstan tíð eisini við í fyrireikingunum til Listastevnuna. Men hann tók seg burturúr – uttan nakra ósemju – og fór heldur aftur at skipa fyri Jazzfestivalinum.

Eg havi altíð verið meira enn pionerur enn ein viðlíkahaldari. Helt eisini tað vera spennandi at flyta festivalin út úr Norðurlandahúsinum, sigur Brandur.

Tískil varð farið undir at fyrireika Jazzfestivalin, har spælt var í Gongugøtuni og á smærri. Ikki tí. Stór nøvn sum Stig Rossen hava eisini verið á vitjan, men konseptið var nakað øðrvísi.

Men tjúgu eru nóg mikið, heldur Brandur.

Nú hava vit roynt hetta konseptið í tjúgu ár, og tað er so nógv, sum er broytt. Tað gevur onga meining at fasthalda tað sama, sigur Brandur.

Hann sipar millum annað til, at býurin, tónleikararnir og nógv annað er so nógv broytt.

Vit síggja nú ein café mentalitet í Havn. Tá vit byrjaðu vóru heldur eingi skeinkiloyvi í Havn, og jazzur var næstan ein politisk støðutakan. Nú eru fólk meira avslappað, tí er eisini hóskandi við onkrum nýggjum, sigur Brandur.

Jazzfestivalurin hevur samlagt hýst eini 3.000 tónleikarum.

### Nýta góðu árini

Unna og Brandur eiga bæði vaksin børn og abba- og ommubørn í Danmark. Tey flestu búgva í Keypmannahavn, og tað ger ein stórur partur av vinaskaranum hjá hjúnunum eisini í Keypmannahavn.

Skal mann nýta nøkur góð ár afturat, so má mann gera tað, meðan mann kann, sigur Brandur, sum heldur tað fara at vera trupult at siga farvæl við Føroyar, men hann fer at vitja aftur.

Unna og Brandur hava áður roynt at búð í øðrum londum, soleiðis at hetta ikki er nakað nýtt fyri tey.

Og Brandur fer eisini at spæla saman við sínum upprunaliga orkestrið Irving Anckers Sekstet, sum hann spældi við í 1950.

– Tað passar best fyri meg at fara frá, tá eg eri aktivur, sigur Brandur, sum eisini gevst á Tórshavnar musikskúla.

### Musikari og heilsøla

Brandur byrjaði sum 21 ára gamal sum yrkistónleikari við saxofon sum ljóðføri kring Norðnalond Hetta helt fram í tíggju ár til tey í 1965 fluttu til Føroya.

Eg hevði altíð hug at flyta til Føroya, sigur Brandur.

Tey fyrstu nógvu árini í Føroyum høvdu Brandur og konan egna heilsølu. Brandur er annars útbúgvin bókbindari, men tónleikurin eigur hjarta hjá honum.

Síðst í áttatiárunum gjørdist hann leiðari fyri Skansastovu, sum skuldi verið avloysari fyri Perluna sum spælistað. Men hetta gjørdist ongantíð soleiðis, og tað var heldur musikskúlan, sum fekk Skansastovan til venjingar og annað.

Brandur hevur verið til at vant og mynda ein fittan part av rútmiska tónleikinum í Havn og í Føroyum.

Hann stóð í sínari tíð á odda fyri Bigband og hevur eisini spælt við í fleiri øðrum orkestrum.

### Verkætlan

Ungdómurin hevur verið ein stórur partur av lívinum hjá Brandi í Føroyum. Og hesum sleppur hann ikki heilt enn.

Tónaungdómur, sum er eitt felag fyri ungar tónleikarar, fær í næstum limaskap í altjóða tónleikafelagnum fyri ung. Í hesum sambandi verður skipað fyri stórari tónleikastevnu í juli komandi, har einir 400 tónleikarar úr nógvum londum vera við.

Við sínum royndum verður tað sjálvsagt Brandur, sum fer at stíla fyri hesum. Og hann roknar eisini við, at hetta er passiligt at arbeiði, soleiðis at hann eisini fær tíð til síni hobby.